

Jógvan Sundstein

# Skemtiligt álvara ella álvarsamt skemt

Við nútímans tøkni hevur borið til at búgva uttanlands og kortini hava samstarv við føroysku peningastovnarnar. Sum privat persónur havi eg konto í donskum banka, men samstundis havi eg eisini konto í føroysku peningastovnunum, tí mín føroyska inntøka, skal sjálvandi fara inn á hesi konti. Á sama hátt er eisini neyðugt fyri føroyskar fyritøkur, sum eg arbeiði fyri, at hava samskifti við bankarnar í Føroyum. Hetta samskifti hevur nú í fleiri ár riggað uttan trupulleikar.

Tað hevur ikki verið neyðugt hjá mær at hava føroyskan netbanka, men Elektron skipanin við telefontænastu og telefaxtænastu hevur verið ein stór hjálp. Við einum loynitali hevur verið møguligt at fingið støðuna á kontoni gjøgnum telefontænastuna, og annars tá tørvur er á tí at fáa útskrivtir gjøgnum faxtænastuna.

**_Føroya Banki hevur broytt navn til tað fullkomuliga identitetsleysa NordikBank. Men tíbetur sær ikki út til, at fólk taka hetta til sín. Mest brúkta navnið er framvegis Føroya Banki_**

Men so kemur speril í. Nøkur ljós høvd í teim meira ella minni "danifiseraðu", (onkur kallar tað "globaliseraðu") føroysku bankunum finna út av, at nú er Elektron ikki nóg gott longur. Nú skal okkurt sum eitur SDC yvirtaka kt skipanina, tí tað er meira danskt, og tí pr. definitión meira nútímans. Boð koma út um, at umleggingin verður framd eitt langt vikuskifti í mai mánaða. Í nakrar dagar virkar netbankin ikki, sjálvtøkan virkar ikki, telefontænastan virkar ikki og telefaxtænastan verður heilt avtikin.

Eftir hvat ið ljóðar, so eru trupulleikar við at fáa sjálvtøkurnar aftur at virka, netbankin hjá fólki gevur trupulleikar, skatta- og lønngjaldsskipanirnar hava eisini sínar trupulleikar o.s.fr.

Sum nevnt eri eg bert av og á í Føroyum, so eg havi ikki roynt sjálvtøkurnar síðani umleggingina, og netbanka havi eg sum sagt ikki. Men telefon- og telefaxtænastuna havi eg brúkt javnan. Aftaná umleggingina ringdi eg til peningastovnarnar. Fyrst til Føroya Banka. Har kom telefonsvarari, sum segði, at telefonin var opin til klokkan 22. Um eg bíðaði nóg leingi tók telefonin við. Hon ringdi eina góða løtu, men har kom einki svar. Nakrar dagar seinri eydnaðist at fáa onkran at svara. Eg vildi gjarna hava skil á nýggju tænastuni og nýtt loynital.Eg bað um at tosa við einar tveir navngivnar persónar, men teir vóru sjálvandi ikki til staðar. Síðani lovaði telefondaman at senda mær eitt nýtt loynital til eina ávísa konto. Men tað er enn ikki komið. Sigast skal tó, at eg fekk váttað saldo og nakrar flytingar frá telefondamuni, sum annars var bæði fólkalig og skilagóð.

Eisini ringdi eg til Eik Banka. Men har var stórt sæð sama skilið. Aftaná tógvið stríð fekk eg tó fatur á einum persóni, sum vinarliga hjálpti mær við at vátta eina saldo. Men eg kom ikki nærri eini nýggjari telefontænastuskipan. Nakað frægari gekk, tá eg ringdi til Suðuroya Sparikassa. Har svaraði telefonin lutfallsliga skjótt, og eg fekk svar uppá nakrar spurningar. Men framvegis eingin nýggj telefontænasta.

Sjálvandi skal ein ikki kverulera meira enn hægst neyðugt, men føroysku peningastovnarnir hava í fleiri ár havt eina góða skipan við fleiri skilagóðum tænastum. Tað skuldi tí ikki veri neyðugt við eini umfatandi umlegging. "Never change a winning team".

Men gjørd gerð fær onga vend. Gomlu telefontænastuna fái eg ikki aftur, men vónandi fái eg skil á eini nýggjari, nú hvítusunnan er farin afturum. Tað sum verri er, er at faxtænastan er horvin. Eingin útskrivt verður at fáa í framtíðini uttan eftir serligari avtalu og fyri ein lutfallsligan dýran kostnað. Ikki serliga kundavinarligt. Og so hevur umleggingin kostað peningastovnunum stóra milliónaupphædd.

Til seinast eitt lítið hjartasuff afturat. Føroya Banki hevur broytt navn til tað fullkomuliga identitetsleysa NordikBank. Men tíbetur sær ikki út til, at fólk taka hetta til sín. Mest brúkta navnið er framvegis Føroya Banki. Men skal ein vera heilt formellur, so er tað í veruleikanum Sjóvinnubankin, sum enn er virkin.



Jóna Mortensen

# Skulu samkynd hava loyvi at ættleiða ?

Ein viðbrekin spurningur, tí sigur tú nei, ert tú fordómsfull og dømandi. Sjálvandi eru samkynd líka góð foreldur, sum eg og onnur, tað hevur jú einki við seksuella orientering at gera, hvussu ein er sum persónur. Men tað sum fólk gloyma, haldi eg, er at ættleidd børn eru meira »viðbrekin« enn biologisk børn. Tað er í hvussu so er mín roynd. Tey skulu fyrihalda seg til nógv meira enn biologisk børn. Hvaðani komi eg, hvørji eru míni biologisku foreldur, hví havi eg ein annan húðarlit. Tey eru ofta rastleys og føla seg ofta ikki heilt accepteraðan, føla at tey allatíðina skulu »forsvara seg«.

Hví verði eg happað, ja trúgv mær, eg veit hvat eg tosi um. Happing er ikki fremmand í Føroyum og ongantíð verri enn, tá tey eru børn. Eg kann bara ímynda mær, hvat tey skulu ígjøgnum, tá tey skulu »forsvara« at hava tvey foreldur av sama kyni. Fordómarnir fyri samkyndum eru so nógvir bæði her og arðastaðni, tað síggja vit jú allatíðina. So kann ein so siga, skulu tey samkyntu so svíða fyri at so er? Tað áttu tey ikki, vit hava jú lógir fyri, at soleiðis átti tað ikki at verið. Men veruleikin er jú ein annar, og tað mugu vit fyrihalda okkum til. Vit liva enn í eini lítlari ostaklokku, hvar fordómur stórtrívist, tíverri.

Fyri 8 árum síðani stóð ein grein um hettar sama evni í einum donskum blað, »Adoption og Samfund«. Eg sat akkurát og læs greinina, tá dóttirin sum tá var 9 ár kom inn, hon spurdi meg hvat stóð har. Eg forklári henni, at tað stendur, at samkynd eiga at hava rætt til at ættleiða. Hon hugdi upp á meg og segði, nei so hevði eg heldur vilja doyð á gøtuni í India.

Hví sigur tú so segði eg.

Tí tað er nóg strævið at vera annarleiðis í Føroyum, sum er, svaraði hon. Og eg trúgvi, at hattar er akkurát trupuleikin. Tað er ein ov stórur biti hjá børnunum at slúka. Tey eru so nógv annarleiðis sum er, at fundamentið má verða so »vanligt« sum gjørligt. Eg vóni ikki, at eg traðki á nakran, tí trupuleikin er ikki um foreldrini eru samkynd, tað er holdningurin í samfelagnum til samkynd, sum er trupulleikin.



Jeffrei Henriksen

# Samskipað innskúling?

Sosialurin endurgevur landsstýriskvinnuna í mentamálum fyri at siga, »at verandi skúlaskipan hevur tørv á at verða umskipað, so hon í størri mun hóskar til natúruna hjá barninum.« ... »tað eigur at bera til at laga eina skipan til, *sum tekur støði í barninum ...«*

So satt, so satt!

Men tað verður ikki gjørt, so sum nú er ætlanin, við at seta børn á skúlabonk, áðrenn tey eru búgvin til slíkt. Tað er nóg ringt, sum er, at tey verða koyrd í skúla 7-áragomul.

Tú kanst altíð vísa á okkurt 7-áragamalt, sum dugir at lesa; men hjá fjøld av so ungum børnum er tað at skula læra at lesa ein órímilig plága, órímilig, tí tey koma skjótari á lagið, um bíðað verður, til tey eru búgvin til tess.

Carl Aage Larsen, professari í undirvísingarfrøði, gjørdi á sinni vart við, at *tú kanst byrja lesiundirvísingina, tá ið børnini eru 6-ára gomul; tá tekur tað 4 ár at læra at lesa. Vit kunnu byrja, tá ið tey eru 7 ár; tá tekur tað 3 ár. At byrja við 8-ára gomlum tekur 2 ár. Hjá 9-ára gomlum tekur tað 1 ár.* Hann visti eisini at siga frá, at einaferð vitjaði ein lærarabólkur úr Niðurlondum danskar skúlar; tey undraðust á, at donsk børn dugdu líka væl at lesa sum tey í Niðurlondum, hóast tey í Danmark ikki fóru í skúla fyrr enn 7 ára gomul.

Gevið gætur, at tað – »eitt nú í Danmark« – vóru **politikararnir**, ið skipaðu fyri, at børnini skulu í skúla longu 6-áragomul; lærararnir mótmæltu!

-

Takk havi Asta í Toft fyri tað, hon sigur í sama Sosiali. Har verður tikið støði í barninum.